# Nøvn



## TØKK

Hjartans tøkk veita vit øllum, sum á ymsan hátt sýndu samkenslu, tá okkara kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Amandus Sørensen**
**Tórshavn**

andaðist og varð jarðaður.

Takk til Hera Joensen, prest, fyri troystarrík orð. Takk til B8 á Landssjúkrahúsinum, sum vóru um pápa okkara, hansara síðstu tíð. Takk til Marner og Jens Lisberg fyri vakran sang. Takk til berarar, sangarar, organist, kirkjutænarar, gravarar og til teir, sum stóðu fyri kavaruddingini. Takk til tykkum, sum bakaðu og til bindiklubban á Argjum, sum stóðu fyri ervinum. Takk til Sólrun Gleðisheygg og Regin Joensen fyri dyggan stuðul. Takk til tykkum, sum ringdu, góvu blómur, krans og til tykkum mongu, sum vitjaðu og fylgdu Amandus til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Martina, Sigrid, Janus, Katrin, Inga-Maria og Egil**

## 40 ára starvsdagur



Tann 1. februar 1971 byrjaði Hans Djurhuus á Nesi í Vági sum lærlingur á deildini hjá Føroya Gjaldstovu í Vági. Sostatt hevur Hans júst havt 40 ára starvsdag.

Í lærutíðini starvaðist Hans eisini eitt skifti á deildini í Havn, men varð settur í fast starv á Gjaldsstovuni í Vági, eftir lokna lærutíð.

Tá gamli tollarin í Vági (Hans Sumberg, sáli), fór frá fyri aldur í 1987, søkti Hans hetta starvið, sum varð lýst leyst, og fekk hann tað. Hann tók so við hesum stavi 1. mai 1987, fyrstu árini við støð í Vági, men seinri komu broytingar við samanleggingum og rationaliseringum, sum førdi til, at Gjaldstovan og Tolleftirlitið, varð lagt saman í ein stovn á Tvøroyri – í dag TAKS.

## Hálv øld síðan Victor Danielsen andaðist

Í dag, 2. február, eru fimmti ár farin, síðan Victor Danielsen, trúboðari, bíbliutýðari og skald, andaðist.



Victor varð føddur í Søldarfirði, 28. mars 1894. Hann gekk á læraraskúla í Havn 1911 - 1914, tá ið hann innan fyri Heimamissiónina upplivdi eina andaliga kollvelting, sum fullkomiliga broytti hansara lív.

Hann byrjaði sum lærari við skúlarnar í Søldarfirði, á Glyvrum og í Lamba, men gavst longu 6 - 7 mánaðir seinni og byrjaði at virka sum trúboðari. Í 1916 fór hann úr kirkjuni og gjørdist ein hin ídnasti trúboðarin innan fyri brøðrasamkomuna, og alt sítt lív ferðaðist hann kring alt landið og prædikaði. Í 1920 giftist hann Henrikku Malenu f. Olsen úr Søldarfirði, og í 1928 fluttu tey til Fuglafjarðar.

Victor gjørdi tað bókmentaliga bragdið einsamallur maður at týða alla Bíbliuna til føroyskt. Nýggja Testamentið kom út í 1937, og 19. mars í 1949 lá øll Bíblian á fyrsta sinni á borðinum á okkara móðurmáli.

Victor umsetti umleið 900 sálmar til føroyskt og yrkti sjálvur einar 30. Umframt Bíbliu og sálmabók skrivaði Victor Danielsen 2 skaldsøgur: Aðru ferð (1927) og Nei, lyftið sveik ikki (1947). Umframt hetta týddi hann umleið 20 bøkur til føroyskt.

Gjøgnum bókmentaliga arbeiði sítt, serliga gjøgnum bíbliutýðingina og sálmabøkurnar, fekk Victor Danielsen sera stóran týdning, og ávirkan hansara, sum røkkur langt út um brøðrasamkomuna, hevur havt sera stóran týdning fyri Føroyar og ikki minst fyri føroyskt samkomu- og kirkjumál.

Í desember mánaði 1999 varð Victor Danielsen saman við William Heinesen kosin til aldarinnar rithøvund av lesarum Dimmalættingar. Tann 28. september 2008 varð standmynd av Victori Danielsen avdúkað í Fuglafirði.

## Fríggjadagin fingu 22 heilsurøktarar prógv á Heilsuskúla Føroya



*__Aftast frá vinstru :__ Britt Kirke Djurhuus Vágur, Guðrið á Lofti Sandavágur, Bingerð Hjalmarsdóttir Toftir, Kristianna Poulsen Sumba, Ann Thomsen Hvalba, Henny Vest Klaksvík, Eyðgunn Dam Kollafjørður, Diana Poulsen Strøm Sumba, Lydia Rasmussen Klaksvík, Marjun Olsen Porkeri, Randi Josephsen Kunoy, Annika á Marknagili Klaksvík, Elsebeth Viðoy Simonsen Viðareiði, Helena Reinert Eliasen Tórshavn og Rakul í Gerðinum Trongisvágur. __Fremst frá vinstru :__ Andrea Gilston Danielsen Sumba, Daisy Niclasardóttir Elttør Klaksvík, Eyðhild Vilhelm Vágur, Heri Højsted Tvøroyri, Louisa Enni Tvøroyri, Sigrid Jacobsen Klaksvík og Sonja Thorleifsdóttir Tórshavn.*